# VIÐ EGNARI T

**DAGSTOVNUR** – Mær dámar ordiliga væl at fiska. Tað havi eg ofta gjørt, sigur 5 ára gamla Sigrid Sóleyardóttir Hórðará úr Vestmanna. Mikudagin var hon farin niðan á ta ovaru byrgingina í bygdini, saman við hinum børnunum í sínari stovu, at fiska síl. Kanska fiskieydna verður við teimum hesa løtuna

Snorri Brend

Hetta var tann stóri útferðardagurin hjá børnunum í stovuni við heitinum »Keldan«.

Avtala var gjørd um at tey skuldu møta upp við ovaru byrgingina – á nú rópar eitt av børnunum á hana. Tey eru eisini brá eftir at fáa maðkin og húkin útí. Kanska bíðar onkur fongur eftir teimum beint undir vatnskorpuni.

– Ja, eg eri ordiliga spent, sigur Sigrid.

**» Fiskieydnan var ikki til staðar beint tá. Heldur hinvegin. Her var hvørki síl ella laksur á húkinum, men fast stóð í botni**



**SÍLAVEIÐA**

*Veðrið er eingin forðing, tá børnini í Gjáarlon tóku tráðurnar fram og fóru á sílaveiðu við ovaru byrgingina í Vestmanna. Aftaná var ætlanin at tey skuldu grilla fongin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Vatninum, tey kalla – kl. 9:30 henda morgunin. Men sum altíð, tá nógv børn skulu gerast klár, eru altíð seinkingar á vegnum.

Børnini hava áður gjørt ymiskar útferðir, men tað var serliga hesa sum tey gleddu seg almikið til. Hetta var nevniliga fyrstu ferð, at tey royndu júst hetta.

Tað hevði verið spennandi um tey fingu okkurt sílið. Ætlanin er nevniliga, at tey skulu grilla aftaná, og hvør veit, kanska endar okkurt silið á grillini.

Men eitt av starvsfólkunum, Laila Friis upplýsir tó, at tey hava bundið um heilan fingur, og hava tikið okkurt við at leggja á grillina.

Hon fær ikki tíð at tosa meiri, tí

## Eingin forðing

Veðrið var ikki av tí allarbesta henda mikudagin. Í Vestmanna var skýggjað og rættiliga grovir ælingar komu við jøvnum millumbilum inn yvir bygdina.

Fyri børnini í dagstovninum Gjáarlon var hetta kanska júst til fyrimunar. Gamalt var hjá sílaveiðumonnum at siga, at best beit á í slíkum veðurlíkindum. Veðrið er so eingin forðing fyri tey.

Børnini og tey vaksnu vóru øll ílatin til endamálið: Góð og heit klæði innast. Regnklæðir uttan. Og sjálvandi ein bjargingarvest uttast. Slíkt hoyrir avgjørt eisini við til fyrireikingina av eini væl eydnaðari útferð.

